# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Einalærari settur í Hovi



Mentamálaráðið hevur sett Óla Johannesen í starv sum einalærari í Hovs skúla. Óli tekur við starvinum mánadagin 19. mars 2007.

Óli Johannesen tók prógv sum lærari á Føroya Læraraskúla í 1999 og hevur eftir lokna útbúgving verið lærari í Tvøroyrar skúla og læraravikarur í Skúlanum á Leiti og í Hvalbiar skúla.

## Signar á Brúnni á brúnni á Ziskatrøð



SKÚLI

Mentamálaráðið hevur fyribilssett Signar á Brúnni, fyrrverandi lærara í Fuglafjarðar skúla sum skúlastjóra í Skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík.

Klaksvíkar Býráð hevur í umsókn 16. februar 2007 søkt Mentamálaráðið um at gera broytingar í skúlabygnaðinum við eini einstreingjaðari leiðslu. Býráðið hevur tikið avgerð um at gera hesar broytingar í sambandi við, at skúlastjórin í Skúlanum á Ziskatrøð, Asbjørn Lómaklett, er farin úr starvi. Eisini hevur varaskúlastjórin, Eigil Hentze, søkt um at fara úr starvi 23. mars 2007.

Umsóknin hjá Býráðnum er í løtuni til viðgerðar í Mentamálaráðnum. Fyri at tryggja leiðsluviðurskiftini í Skúlanum á Ziskatrøð í tíðarskeiðinum, til støða er tikin til umsóknina hjá Klaksvíkar Býráð um broytingarnar í skúlabygnaðinum, er tað at Mentamálaráðið hevur fyribilssett Signar á Brúnni, fyrrverandi lærara í Fuglafjarðar Skúla, sum skúlastjóra, og Ólav Sjúrðarberg, lærara í Skúlanum á Ziskatrøð, sum varaskúlastjóra.

Leiðslan er fyribilssett í tíðarskeiðnum 19. mars til 1. juni 2007.

# Kensluborin kvinnulist í Lítluvík

Fríggjadagin kl. 14.00 letur spennandi listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík í Tórshavn. Tað er listakvinnan Annika Hansen, sum fer at sýna fram einar 20 myndir, og tey, ið leita sær í Lítluvík kunnu vænta sær myndaevni, ið ein sjálvdan sær her heima.

Yndis myndaevni hjá Anniku er kvinnur, naknar kvinnur, og tær verða málaðar á ein ekspressionistiskan og litríkan hátt. Onnur myndaevni eru heilt abstakt, men tað, ið myndirnar hava í felag er, at tær eru kensluborinar og villar, heldur enn penar.

Annika Hansen er 40 ára gomul og hevur búð í Århus meira enn helvtina av sínum lívi. Samanlagt hevur hon gingið 5 ár á listaskúla, einamest í Århus, men eitt tíðarskeið gekk hon eisini á listaskúla í Dakkar í Senegal. Annika hevur havt fleiri framsýningar í Århus, men bert einaferð áður hevur hon sýnt fram í Føroyum. Hetta var til eina felags framsýning, sum Ole Wich tók stig til. Nú 15 ár seinni leitar listakvinna so aftur til klettarnar fyri at sýna fram sína list og bjóða okkum her heima eina øðrvísi listarliga upplivning.



Framsýningin í Lítluvík er bert opin í tríggjar dagar, frá fríggjadag til sunnudag, og opið er allar dagarnar frá kl. 14.00 til 20.00.

# Føroyingafelagið í Århus nýggja nevnd



*Nýggja nevndin í Føroyingafelagnum í Århus. Frá vinstru: Elin Jacobsen, Eivind Simonsen, Jákup Olaf Johannesarson, Hergeir P. Vang og Finnur Jensen*

**Nýggja nevndin í føroyingafelagnum í Århus hevur skipað seg og hevur longu sett nøkur mál**

FØROYINGAFELAG

Á eykaaðalfundi grækarismessu varð nýggj nevnd vald í føroyingafelagnum í Århus. Og nú hevur hon skipað seg. Hergeir P. Vang er formaður, Finnur Jensen, næstformaður, Elin Jacobsen, skrivari, Eivind Simonsen, kassameistari, og Jákup Olaf Johannesarson, PR-limur. Manningin er so at siga nýggj. Bert Hergeir P. Vang valdi at stilla uppaftur.

Á fyrsta nevndarfundi varð samtykt at byggja víðari á megnar arbeiðið, sum undanfarin nevnd hevur gjørt. Harumframt varð semja um, at leggja størri orku í at profilera felagið úteftir. Sum møguleika verður nevnt at menna samstarvið við systirfelagið í Keypmannahavn, at menna limablað felagsins, Áarósan, við fleiri haldarum, og at skipa fyri fleiri tiltøkum í hølum felagsins, Áarstovu, til gagns fyri núverandi og komandi limir.

Eitt aðalmál seinastu árini hevur verið at profilera felagið í Føroyum fyri at fáa fleiri føroyingar at búgva og lesa í Århus, men nevndin staðfestir, at fíggjarligu karmarnir eru vánaligir. Og tað er eingin loyna, at felagið saknar betur stuðul frá almennari síðu í Føroyum. Hetta verður eisini nakað, ið nýggja nevndin framhaldandi fer at arbeiða fyri at bøta.

Meir at lesa um felagið á www.aarstova.dk.